## Spennandi vísukonsert í Atlantis




*Komandi fríggjakvøld verður vísukonsert við Per Warming og Johan Piribauer í Atlantis í Klaksvík*

**Fríggjakvøldið verður skipað fyri vísukonsert í Atlantis. Tað verða danin Per Warming og lapplendingurin Johan Piribauer, sum fara at spæla. Í stóran mun verður talan um egið tilfar**

TÍÐINDASKRIV
*Atlantis*

**Klaksvík:** Vísukonsertin fríggjakvøldið er eitt samstarv við norðurlandahúsið. Sama konsert verður eisini hildin í Stóra Pakkhúsið í Vági.

Per Warming er 60 ára gamal og búsitandi í keypmannahavn. Til dagliga er hann rithøvundur, men eisini fæst hann við at syngja. Best kendur er hann fyri sangin, Du kom med alt det, der er dig, sum stendur í donsku háskúla sangbókini. Eisini vann hann kappingina Syng Dansk, sum varð hildin í 2003. Hann hevur útgivið egnar sangir á útgávuni Blues Barok, umframt at hann eisini spælur tilfar hjá Vysotskij, sum verður roknaður, sum tann russiski Bob Dylan.

Johan Pirbauer, er úr Lapplandi. Tónleikurin hjá honum verður ofta sammettur við vísukenda tónleikin, hjá Hoolanbandoola Band, har Bjørn Afzelius og Mikael Wiehe vóru høvuðsmenn., Eins og hjá Afzelius og Wiehe, viðgera tekstirnir hjá Piribauer samfelagslig viðurskifti. Johan Piribauer hevur útgvið fýra fløgur, og tann fimta er á veg. Hann er fjøruti ára gamal, og fæst burturav við mentan í Lapplandi

Konsertin í Atlantis byrjar fríggjakvøldið klokkan 21 og atgongumerkir til tiltakið á 100 kr. fáast í húsinum ein tíma frammanundan.

## Birte Rasmussen í Norðoya Kunningarstovu

TÍÐINDASKRIV
*Norðoya Kunningarstova*

Birte Rasmussen, sum er av danskari ætt, hevur nomið sær kunnleika í málningalist líka síðani miðskeiðis í seksti árunum.

Hon hevur luttikið á nógvum framsýningum bæði í Danmark og Føroyum, hon hevur luttikið á Norðoyastevnu framsýningum nakrar ferðir, og eisini luttók hon á framsýningini "Fram í ljósið" hjá Norðoya Sparikassa. Hon hevur millum annað teknað skreytmerkið sum M.B.F. gav út í 1998. Hon vann eisini 1. virðisløn í eini plakatkapping hjá Fyens Sygehuse í 1989.

Birte og maðurin Regin, fluttu til Føroyar í 1994, og búgva nú í Klakksvík.

Framsýningin letur upp leygarmorgunum 4. septembur klokkan 10:00 og er opin allan septembur mánað í vanligari upp og afturlatingartíð hjá Norðoya Kunningarstovu.



*Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, heldur, at tað er stórur tørvur á einari ráðstevnu um vælferðargransking í Føroyum*

*Savnsmynd*

# Ráðstevna um vælferðargransking

**Í dag og í morgin verður ein ráðstevna hildin á hotel Tórshavn um vælferðargransking í útnorðuri. Umboð fyri Ísland, Grønland og Føroyar fara at halda fyrilestrar og kjakast verður eisini um hetta evnið. Fríggjadagin verður so ein almennur pallborðsfundur, eftir at tikið er saman um ráðstevnuna**

RÁÐSTEVNA
*Solby A. Eliasen,*
*solby@sosialurin.fo*

Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, greiðir frá, at endamálið vð ráðstevnuni er at fáa varpað ljós vælferðargransking.

Granskingin er býtt upp í tríggjar bólkar, sosialu, heilsu og arbeiðsmarknaðarviðurskiftini í ávíkavist Grønlandi, Íslandi og Føroyum.

– Tað er sera týdningarmikið, at vit kunnu granska hesi øki í Føroyum, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Hon leggur tó afturat, at hetta ikki er grundað á nakra ítøkiliga sak, sum er komin undan kavi í sambandi við vælferðarsamfelagið.

– Vit hava eitt vælferðarsamfelag í dag, men tað ræður um at fáa lýst tað, sigur hon. Her hugsar hon serliga um, at hyggjast skal at, hvussu vælferðarsamfelagið sær út í dag, hvussu tað mennist og ikki minst, hvar er neyðugt at seta inn.

Petra Johnsdóttir Joensen er púra avgjørd, tá hon verður spurd, um tørvur er á eini slíkari ráðstevnu í Føroyum.

– Ikki minst fyri at síggja, hvussu vit standa okkum í mun til grannasamfeløgini, sigur hon.

### Pallborð

Skráin fyri ráðstevnuni býður upp á mangt áhugavert, har viðkomandi persónar fara at tosa um hesi trý samfelagsviðurskiftini, sum hava so stóran týdning í einum vælferðarsamfelagið.

Ráðstevnan byrjar í dag, hósdagin, við at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setur hana.

Síðani verða upplegg frá bæði føroyskum og útlendskum fyrilestrarhaldarum. Umleið 50 luttakarar verða við á ráðstevnuni, sum endar í morgin við einum almennum pallborðsfundi, har kjakast verður um tað, sum í høvuðsheitum kemur burtur úr ráðstevnuni sjálvari.



# Skal blíva til egg ella unga í Vági

**Landstýrið er við at missa tolið við Fiskavirking. Letur Fiskavirking vikið í agi uppaftur nú, má tað takast úr Fiskavirking, so at onnur kunnu fáa møguleikan, sigur løgmaður**

FLAKAVIRKIÐ Í VÁGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú skal fiskavirking lata flakavirkið í Vági uppaftur, ella má Fiskavirking verða til reiðar at lata øðrum virkið, sigur løgmaður*

– Nú skal tað blíva til egg ella unga við flakavirkinum í Vági.

Tað sigur Jòannes Eidesgaard løgmaður.

Mikudagin fekk løgmaður ein fyrispurning frá Tórbjørn Jacobsen løgmanni um vánaligu støðuna hjá vinnulivinum í syðru helvt í Suðuroy.

Tá ið samgongan varð skipað, var ein bólkur av tingmonnum settur at arbeiða við ætlanum um at menna syðru helvt í Suðuroy.

Síðani hoyrdist lítið og onki aftur til hendan bólkin og løgtingsmaðurin úr Eysturoy vildi hava at vita, hvussu landið liggur við syðru helvt í Suðuroy.

### Skulu hava greitt svar

Jóannes Eidesgaard sigur, at trupulleikarnir í syðru helvt í Suðuroy, og í Suðuroy sum heild, eru so stórir og samansettir, at tað finst onki einfalt svar uppá, hvussu teir kunnu loysast. Tað ber heldur ikki til hjá einum bólki av tingmonnum at loysa trupulleikarnar. Tingbólkurin hevur kortini ikki gingið heilt fyri onki, tí hann hevði havt fleiri fundir við Fiskavirking um flakavirkið í Vági.

– Tíðliga í vág lovaði Fiskavirking, at flakavirkið í Vági skuldi latast upp aftur til at arbeiða saltfisk í, sigur løgmaður við Sosialin.

Fiskavirking upplýsti eisini, at tað fóru at vera gott 40 arbeiðspláss á virkinum. Men síðani er onki hent sigur løgmaður, og nú er tað ein spurningur um, hvussu leingi afturat, vit skulu trúgva tí, sum Fiskavirking sigur.

– Hesari støðuni kunnu vit als ikki liva við longur

Hann sigur, at møguleikar mugu nú skapast fyri, at flakavirkið í Vági letur uppaftur ongantíð ov skjótt. Landsstýrið fer nú biðja fiskavirking um eitt greitt svar uppá, hvør ætlanin er við virkinum í Vági.

– Vit vilja hava greitt at vita frá Fiskavirking um ætlanin er at lata virkið upp aftur ella ikki

Hann sigur, at kann fiskavirking ikki vátta at virkið verður latið uppaftur nú, mugu onnur fáa møguleikan.

– Letur virkið í Vági ikki uppaftur nú, má tað takast burturúr fiskavirking, so at onnur kunnu fáa møguleikan at lata tað uppaftur.

Hann sigur, at so fer landsstýrið at gera sína ávirkan galdandi so langt sum tilber fyri at fáa Fiskavirking at loysa virkið í Vági burturúr samtakinum so at onnur kunnu fáa høvi at lata tað upp.

– Ein stórur trupulleiki er, at samstundis sum Fiskavirking ikki letur virkið í Vági upp, liggur fyritøkan omaná virkinum, so at heldur ongin annar fær møguleikan.

Jóannes Eidesgaard veit, at tað er avmarkað, hvussu stóra ávirkan landsstýrið kann fáa á avgerðirnar hjá Fiskavirking.

– Men eg vildi hildið, at Fiskavirking og Framtaksgrunnurin átti at tikið eitt politiskt ynski til eftirtektar, sigur hann.

– Serliga tá ið vinnuliga støðan verður havd í hugað, átti tað at havt týdning, at landsstýrið hevði eina ávísa meining um viðurskiftini, sigur løgmaður.

Er tað væntandi, at Fiskavirking fer at lata øðrum virkið í Vági til vanliga fiskaframleiðslu, tí so fer tað at liggja í beinleiðis kapping við Fiskavirking.

– Tolir Fiskavirking ikki kapping frá einum einstøkum virki, hevur tað ein veldugan trupulleika, sigur løgmaður stutt.

# Mugu flyta almennar stovnar til Suðuroyar

**– Tað verður neyðugt at flyta almenn arbeiðspláss til Suðuroyar og tað er ein spurningur, sum samgongan hevur í huganum, sigur løgmaður**

FRÁFLYTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað verður neyðugt at seta fleiri almenn arbeiðspláss á stovn í Suðuroy.

Tað er Jóannes Eidesgaard, løgmaður, púra sannførdur um.

Hann sigur, at skal stóra fráflytingin úr Suðuroynni steðgast, verður tað neyðugt at seta arbeiðspláss til fólk við útbúgving á stovn í oynni.

– Eitt er, at arbeiðsloysið hjá ólærdum er stórt. Men tað skal ein bygnaðarbroyting til at steðga fráflytingini í oynni, tí heilt nógv av teimum, sum flyta, eru fólk við útbúgving, sum noyðast at flyta, tí onki arbeiði er til tey í oynni.

– Tað er at fegnast um, at eisini fleiri og fleiri ungfólk í Suðuroy nema sær útbúgving. Tann stóri trupulleikin er tann, at tað er onki starv til tey í oynni, tá ið tey eru liðug.

– Sostatt minkar talið á ungfólkið alsamt og tað er ein stórur trupulleiki.

– Hevði tað eydnast at fingið nakað av tí útbúnað fólkinum suður aftur, heðvi tað loyst nógvar trupulleikar, tí umframt at skapa arbeiði og útvega skattakrónur, hevði tað fingið lív í aftur oynna.Tað vísir seg nevniliga mangan ,at útbúgvin fólk eru góðir ígongdsetarar í nógvum ymsum viurskiftum, bæði í ítrótti, mentan og frítíðarlívi annars og í vinnulívi.

Løgmaður heldur tí, at tað er neyðugt at seta fleiri almenn størv á stovn í Suðuroy.

Tað kann gerast við at flyta almennar stovnar úr Havnini til Suðuroyar.

Hann sigur, at hesin spurningurin er við í viðgerðini, nú samgongan hevur støðuna í Suðuroynna til viðgerðar.

– Støðan í Suðuroy er hættislig og samgongan arbeiðir við málinum og roynir at finna útav, hvat tað almenna kann gera, fyri at venda gongdini.

Sum tað sæst á hinari greinini, er ein partur av hevum royndunum at fáa virkið í Vági ígongd aftur.

– Men ein týðandi partur í hesi viðgerðini er eisini at fáa flyta almennar stovnar til Suðuroyar.

### Mugu skera ígjøgnum

Hetta hevur verið tosað um í nógv ár, men tað er ikki nógv komið burturúr.

Løgmaður ásannar eisini, at tað er ikki ein løtt uppgáva.

Men hann ásannar eisini, at samgongan viðgerð málið við stórari vælvild, tó at tað verður trupult politiskt.

– At málið er trupult, eigur kortini ikki at forða okkum at taka tað upp.

Hann torir heldur ikki at siga nakað um, nær nakað fer at henda.

Umframt at loysa málið politiskt, verður tað uttan iva eisini ein kampur við teir stovnar, sum kunnu koma upp á tal at flyta suður, tí tað er lítið sannlíkt, at stovnar gleðiliga flyta suður.

Løgmaður ásannar eisini, at tað verður neyðugt hjá landsstýrinum at skera ígjøgnum.



*Tað hevur rættiliga stóran týdning at fleiri almenn arbeiðspláss verða flutt til Suðuroynna, sigur løgmaður.Tað er ein spurningur, sum samgongan viðgerð*

Hann veit ikki, hvørjir stovnar kunnu koma upp á tal.

Hann nevnir tó Strandferðsluna sum eitt dømi.

– Uppskot hevur verið á tingi um tað fyrr, men tað fall. Møguliga var tað bara tíð, at tíðin var ikki búgvin at viðgera tað tá.

– Men um nøkur ár, verður Strandferðslan bara Smyril og onkrar smáar ferjur norðanfjørðs, so hon er ein møguleiki at flyta úr Havnini.

Fiskivieiðieftirlitið hevur eisini verið nevnt. Og nú tosað verður um at byggja nýggjan sjúkrasystraskúla, kundi tað eisini verið ein møguleiki at lagt hann í Suðuroy í sambandi við heilsuskúlan á Tvøroyri og Suðuroyar Sjúkrahús.